nøvn nú nøvn nú nøvn nú nøvn nú

Heilsanir

Góða fitta Elin
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum.
Kærar heilsanir ***lítla Elsa***

Góða elskaða Angela
Hjartaliga tillukku við 8 ára føðingardegnum 15. mars, øll góð ynskir sendast tær framyvir, hopandi siggjast vit til dagin.
Allarbestu heilsanir
frá ommu, abba og ommulang í Nólsoy

Góða besta Elin
Hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardegnum.
Ynskja ***Rúni, Sverri, mamma og pápi***

Góða mamma
Hjartaliga tillukku við degnum í dag.
Tær bestu heilsanir
Thordis og beiggin

Góða Annika
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum. Ja, nú fer bilurin ikki at standa stillur í túninum longur.
Heilsan ***frá okkum, Teitur***



Góða Barbara
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum.
Ynskja ***abbi, Kenny, Joy og Brian***

Góða Angela!
Hjartaliga tillukku við 8 ára føðingardegnum 15.3. Tað er gott at eiga eina systur, sum tímir so væl at ansa eftir okkum.
Bestu heilsanir ***frá systrum tínum, Sólvá og Heidi***

Góða Angela!
Nú er tú blivin ein stór genta og røsk at hjálpa mammu og babba. Hjartaliga tillukku við 8 ára føðingardegnum 15.3. Jesus pápi signi framtíð tína.
Bestu heilsanir ***mamma og babba***

Góði babba og abbi
Tillukku við degnum 15. mars. Vónandi fært tú nógv góð ár framyvir. Takk fyri alt tú hevur verið fyri okkum.
Maiken og Jákup



Allarbesta Elin
Tillukku við føðingardegnum í morgin.
Kærar heilsanir ***Húkas og Dr. Bombay***

Góða Barbie
Tú kanst gott koma aftur onkra aðru tíð at syngja Spice Girls - so spæli eg klaver og trummur. Tillukku við føðingardegnum.
Heilsan ***Benjamin***

Góða Angela
Hjartaliga tillukku við 8 ára føðingardegnum mánadagin. Takk fyri hjálpina meðan eg havi gingið við brotnum armi.
Heilsan
vinkona tín Oddvør

Linda
Hjartaliga tillukku við degnum tann 13.
Heilsan ***tín vinkona Anna Marjun***

Góði Jalgrímur
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum mánadagin.
Heilsan ***Jóhan Kári og Oddvør***

Góða Barbara
Mamma og babba ynskja tær hjartaliga tillukku á føðingardegnum. Nú ert tú soooo stór!
Heilsan ***mamma og babba***

Góða elskaða dóttur & systir!
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 11 ára føðingardegnum. Jesus pápi signi teg og tína framtíð. Vit elska teg.
Mamma, babba og Bogi

Góði fitti Jøgga
Eg, mamma og babba ynskja tær hjartaliga tillukku við 30 ára degnum tann 15. mars, eisini ein heilsan til Nicolinu ommu sum fylti 11. mars.
Heilsan ***Randi***

Fitti babba
Tillukku við tí runda degnum sunnudagin.
Heilsan ***Ólavur***

nøvn nú **5 ferðir um vikuna**

20,- kr.

GEVIÐ GÆTUR:
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 20,- kr.
í ❑ frímerkjum, ❑ krossaðum kekki
fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir, sum eru okkum í hendi við postinum kl. 8 á morgni, leggja vit okkum eftir at fáa í blaðið dagin eftir. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Friggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: .....

.....

.....

.....

.....

.....

MYNDINA AFTUR: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur **(skal fyllast út).**

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Tíðindablaðið Sosialurin
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**NØVN NÚ**«